


FØROYABANKI

# Føroya Banki sóknast eftir fleiri leiðarum at luttaka í bankans áhaldandi menning

**Føroya Banki er í eini spennandi menningartilgongd. Í oktober 2009 keypti bankin meirilutan í íslendska tryggingarfelagnum Vørði. Í februar 2010 keypti bankin 12 bankadeildir frá danska peningastovninum Sparbank, 9 deildir í Danmark og 3 deildir í Grønlandi. Sostatt eru yvir 450 starvsfólk í samtakinum, harav helvtin uttan fyri landoddarnar. Høvuðssæti bankans er í Tórshavn.**

**Herfyri viðtóku partaeigarar bankans á ársaðalfundi, at bankin skal skifta navn til BankNordik, sum ber boð um, at bankin hevur ment seg til ein norðurlendskan fíggjarstovn. Nú sóknast bankin eftir fleiri nýggjum leiðarum og lyklastarvsfólkum at vera við til at mynda gongdina í BankNordik í framtíðini.**

## Marknaðarleiðari

Sum marknaðarleiðari fært tú evstu ábyrgd av bankans branding, marknaðarføring, samskifti í Føroyum og uttanlands. Á marknaðardeildini starvast 4 starvsfólk umframt leiðaran. Tú fært tilvísing til stjórn bankans.

**Krøv til umsøkjaran**
Cand.merc., aðra viðkomandi hægri útbúgving ella drúgvar royndir frá líknandi starvi. Leiðsluroyndir.

Sí fleiri upplýsingar á foroya.fo/starv

Freistin at søkja starvið er 18. mai 2010.

## Starvsfólkaleiðari

Sum starvsfólkaleiðari fært tú ábyrgdina av at mynda og íverkseta starvsfólkapolitikk bankans. Á starvsfólkadeildini starvast 3 starvsfólk umframt leiðaran. Tú fært tilvísing til stjórn bankans.

**Krøv til umsøkjaran**
Cand.merc. ella aðra viðkomandi hægri útbúgving. Leiðsluroyndir.

Sí fleiri upplýsingar á foroya.fo/starv

Freistin at søkja starvið er 18. mai 2010.

## Økiskredittleiðari í Danmark

Á økisskrivstovu bankans í Kolding verður ein økiskredittdeild skipað við 3-4 starvsfólkum, har økiskredittleiðarin fær tilvísing til kredittleiðara bankans í Tórshavn.

**Krøv til umsøkjaran**
Cand.merc. ella aðra viðkomandi hægri útbúgving. Leiðsluroyndir og drúgvar royndir við kredittveiting.

Sí fleiri upplýsingar á foroya.fo/starv

Freistin at søkja starvið er 1. juni 2010.

## Onnur størv

### Føroyar

- Kredittserfrøðingar
- Marknaðarfólk
- Ráðgevi til stjórnarumsitingina
- Verkætlanarfólk
- Búskaparfrøðingur

### Grønland

- Kundaráðgevar

### Danmark

- Kredittserfrøðingar
- Kundaráðgevi

www.foroya.fo/starv

SENDISTOVAN